Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
100 Tórshavn

Tórshavn, 16. mai 2025
Journalnr.: 25/11536

Svar frá Sirið Stenberg, landsstýriskvinnu, upp á § 52a fyrispurning nr. 52-102/2024 frá Hannu Jensen, løgtingskvinnu, um løggilding av handverksmeistarum í byggivinnuni

Spurningurin var soljóðandi:
1. Hvussu gongur við at fyrireika lógaruppskot um løggilding av handverksmeistarum í byggivinnuni?
2. Nær kann ein slík løggilding fáast at virka á føroyska byggimarknaðinum?
3. Eru allar aðrar fortreytir, eitt nú neyðuga meistaraútbúgvingin, loknar til ta tíð, ein slík løggilding ætlandi skal setast í verk?

Til nr. 1
Ætlandi skuldi uppskot til løgtingslóg um løggilding av handverksmeistarum verða lagt fyri Løgtingið í vár. Hetta eydnaðist ikki, men málið er framvegis, um undirtøka fæst fyri hesum millum samgonguflokkarnar, at koma á mál við arbeiðinum at gera lóggávu um løggilding av handverksmeistarum. Er politisk undirtøka fyri málinum, verður lógaruppskot lagt fram seint í komandi tingsetu.

Løggilding av handverksmeistarum viðvíkur málsøkjum hjá fleiri landsstýrisfólkum, og mugu Barna- og útbúgvingarmálaráðið og Umhvørvismálaráðið vera partur í arbeiðinum at fyrireika lóggávuna.

Til nr. 2
Tað er ikki greitt, nær møgulig løggilding kann fáast at virka á føroyska byggimarknaðinum. Eisini tað fer eitt møguligt lógaruppskot at taka støðu til.

Til nr. 3
Hóast ávísar fyrireikingar eru gjørdar, er tað ikki greitt, nær ein meistaraútbúgving kann fáast at virka. Útbúgvingin skal fyrireikast, og tá eitt nýtt útbúgvingartilboð verður sett á stovn, skal ein leistur finnast fyri at fíggja nýggju útbúgvingina. Hetta er eitt mál, sum fer at verða viðgjørt saman við Barna- og útbúgvingarmálaráðnum.

Uttanríkis- og vinnumálaráðið, 16. mai 2025

Sirið Stenberg
landsstýriskvinna